

Bárður hevur eitt fyrimyndarligt samstarv við Bókadeild Føroya Lærarafelags, og higartil hava allar bøkurnar havt børn sum málbólk, men hann hevur eisini okkurt liggjandi til vaksin. Um og nær hetta verður givið út, veit hann ikki at siga. Í løtuni er hann í holt við at myndprýða eina barnabók hjá øðrum rithøvundi, og henda bókin kemur væntandi út komandi ár.

Bókin, »Ein hundur, ein ketta og ein mús, er komin út á donskum, íslendskum og fronskum. Hetta gleðist Bárður um, men útgávusamráðingar eru ikki hansara borð. Tað letur hann onnur taka sær av. Men honum dámar væl at koma út við sínum bókum. Og fyri stuttum tók hann lut í einum fronskum listafestivali, har hann saman við øðrum umboðaði norðurlendska list.

## Herðaklapp her og har

Bárður Oskarsson fekk fyrr í ár Barnabókaheiðurslønina hjá Tórshavnar býráð. Í grundgevingini fyri heiðurslønina varð millum annað sagt:

– Teknarin og barnabókahøvundurin Bárður Oskarsson sýnir hugtakandi listarligt hegni, tá hann lýsir eina søgugongd. Tekningarnar eru skemtiligar og hugfarsligar og tola at standa einsamallar. Bárður Oskarsson hevur sermerktan tekningarstíl, har smálutir bera søgugongdini uppi, og trætur og ósemjur koma til sættis.

Harumframt hevur Bárður Oskarsson fingið Vesturnorðurlendsku barna- og ungdómsvirðislønina fyri »Ein hundur, ein ketta og ein mús«.

Viðurkenningarnar hava týdning, hóast pengarnir sjálvdan røkka longur enn til rokningar, sigur Bárður.

– Fyri meg hevur tað serligan týdning, at tað eru fakfólk, sum sita í dómsnevndunum. Tí tey vita, hvat er gott.

Fakligi stoltleikin er ein náttúrligur partur av hugburðinum hjá Bárði, har hann sær tað at tekna sum eitt arbeiði, sum so nógv onnur arbeiði.

## Umhvørvið órógvar ikki

Eitt sereyðkenni við bókunum hjá Bárði er, at søgurnar fáa loyvi at fylla alla síðurnar. Her eru ongar óneyðugar detaljur, og umhvørvið er næstan ikki til.

– Børn eru so konkret, og tey síggja allar detaljur. Tí kann tað órógva søguna at hava alt møguligt annað við, greiðir Bárður frá.

– Eg vil gjarna halda lesaran til ta søguna, sum eg vil fortelja. Tí eru tað persónarnir og tvídráttirnir, sum sleppa at fylla, sigur Bárður, sum hevur búð í Danmark, síðani hann var 17 ára gamal. Men tað er mest av tilvild, at hann býr har, heldur hann. Tað er sum við tekningunum – umhvørvið hevur ikki so stóran týdning.

– Eg eri føroyingur, og eg vil ikki avvísa, at eg aftur fari at búgva í Føroyum. Men tað hevur ikki so stóran týdning, hvar eg eri. Eg kundi flutt hvar sum helst, sigur altjóða føroyingurin, sum hevur føroyska konu og tvey børn, sum eru ávíkavist 7 og 9 ára gomul. Tey eru partur av íblástrinum til søgurnar, men eisini hálvtíðarstarvið á frítíðarsskúla heldur barnsliga sjónarhornið við líka.

## Skemtiligir persónar

Onkuntíð koma søgurnar skjótt, men við hvørt tekur tað langa tíð. Í fleiri ár royndi hann at fáa eina søgu uttan tekst at fungera, og við søguni, »Beinið« eydnaðist tað.

– Teknaðar søgur skulu ikki vera ov fløktar, men tær skulu heldur ikki vera ov einfaldar. Tær skulu fanga og vera stuttligar, sigur Bárður.

Lætta einfalda strikan ber humorin, og Bárður lýsir sínar tekningar sum formar heldur enn detaljur. Tað er sjálvt úttrykkið, sum hevur týdning fyri hendan teknandi úrmælingin. Men hóast detaljurnar ikki órógva, so eru persónarnir – ella dýrini – bæði livandi og stuttlig.

– Eg tekni dýr, tí tað er lætt at gera mun uttan at fornermna. Og vit kenna øll persónsmenskurnar hjá teim ymisku dýrunum. Tí sleppi eg undan longum frágreiðingum, greiðir Bárður frá.

Og øll, sum hava lisið søgurnar hjá Bárði, har ketta, mús, giraffur og hundar eru leikarar, vita hvat hann meinar við. Ságligi hundurin, illsinta kettan og leitandi giraffurin hava síni serligu djóraeyðkenni samstundis, sum tey eru menniskjalig, at eingin ivi er um at søgurnar eru um fólk.